# SÁTTMÁLI

Millum undirritaðu

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag
(í sáttmálanum nevnd “*fakfeløgini*”)

øðrumegin og

Sp/f P.P. Faroe Pelagic (í sáttmálanum nevnd “*Faroe Pelagic*”)

hinumegin er í dag gjørdur hesin sersáttmáli.

§ 1

Økið sáttmálans

Sáttmálin fevnir um øll arbeiðsfólk, sum starvast á virkinum hjá Faroe Pelagic í Kollafirði herundir eisini lossing og avskiping.

§ 2

Lønarásetingar

Partarnir eru samdir um, at tímalønin fyri allar tímar í samdøgrinum, mánadag til og við fríggjadag ( mánamorgun kl. 00.00 til fríggjadag kl. 24.00 ) verður kr. 145,21[1] um tíman, og er hetta galdandi uttan mun til hvussu vaktirnar eru skipaðar ella um arbeitt verður vanliga normaltíð.

Fyri arbeiði leygar- sunnudag og aðrar halgidagar umframt frídagar sambært sáttmálanum millum fakfeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag, verður lønin, sum ásett í sáttmálanum millum fakfeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag, herundir galdandi yvirtíðartakstir. Tímalønin er pr. 1. mai 2014 kr. 194,44[2] fyri leygardagar og kr. 235,68[3] fyri sunnu- og halgidagar.

Harumframt skal gjaldast aldursviðbót sambært teimum til eina og hvørja tíð galdandi takstum í sáttmálanum millum fakfeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Partarnir eru samdir um, at lønin framyvir hækkar við sama prosentstigi, sum lønin hækkar við samráðingarnar, sum fakfeløgini framyvir koma at hava við Føroya Arbeiðsgevarafelag um sáttmálaviðurskiftini á privata arbeiðsmarknaðinum.

Um arbeiðsfólkið ynskir tað, og fakfeløgini skrivliga góðtaka hetta, so kann lønin ásetast til kr. 134,53[4] pr. tíma á dagvaktini (frá kl. 08.00 – 20.00) og kr. 155,89[5] pr. tíma á náttarvaktini (frá kl. 20.00 – 08.00) frá mánadegi kl. 00:00 til fríggjadag kl. 24:00.

§ 3

[1] 1. Mai 2015 kr. 148,42
[2] 1. Mai 2015 kr. 198,73
[3] 1. Mai 2015 kr. 240,88
[4] 1. Mai 2015 kr. 137,50
[5] 1. Mai 2015 kr. 159,33

Summarfrí

Viðvíkjandi summarfrí verður víst til galdandi frítíðarlóggávu.

§ 4

Aðrar ásetingar

Har aðrar ásetingar ikki eru gjørdar í hesum sersáttmála, so eru ásetingarnar í sáttmálanum millum fakfeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag galdandi, herundir ásetingarnar um eftirlønargjøld, limagjøld og aðrar ásetingar. Víst verður til fylgiskjal 1 (yvirlit yvir núverandi viðbøtur – kann verða broytt við komandi samráðingar millum fakfeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag), sum er partur av hesum sáttmála. Viðbót fyri sildaarbeiði verður tó ikki galdandi fyri hendan sáttmála.

Viðvíkjandi ásetingini um upplýsingar til arbeiðsfólk um nær arbeiði byrjar (§ 9 í høvuðssáttmálanum), so skal freistin sambært hesum sáttmála vera 8 tímar. Um serlig viðurskifti eru, t.d. fólk ikki møtir til arbeiðis vegna sjúku, so er nevnda 8 tíma freist ikki galdandi tá onnur fólk skulu boðsendast til arbeiðis.

§ 5

Faroe Pelagic og fakfeløgini eru samd um, at tá Faroe Pelagic gerst limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, kann Føroya Arbeiðsgevarafelag yvirtaka sáttmálan vegna Faroe Pelagic.

§ 6

Gildisskeið og ætlanarlýsing

Hesin sersáttmáli er galdandi frá undirskrivingardegnum og kann uppsigast við tríggjar mánaðir freist til í fyrsta lagi 1. mai 2016.

Viðvíkjandi árunum eftir 2014, so vísa fakfeløgini á gongdina innan onnur sersáttmálaøki, har lønargongdin sum meginregla hevur verið sum í galdandi høvuðssáttmála. Staðfestast kann tí, at við atliti til ætlaðu útbyggingarætlanir hjá Faroe Pelagic, og øktum virksemi hjá virkinum, so eru útlit ikki til, at lønargongdin framyvir verður øðrvísi enn søguliga gongdin hevur víst.

§7

Sáttmálaeintøk

Hesin sersáttmáli verður undirskrivaður í trimum einsljóðandi eintøkum og fær hvør partur sítt eintak.

Tórshavn, tann 6. Mai 2014

| | | |
|---|---|---|
| Føroya Arbeiðarafelag | Havnar Arbeiðsmannafelag | Sp/f P.P. Faroe Pelagic |